Ársins summarmynd

Myndakapping, sum 3arin skipar fyri, endar leygardagin 20. oktober. Tá verða vinnararnir kosnir á torginum í SMS. Tann, ið vinnur, kann tá kalla seg eigara av ársins summarmynd 2001

MYNDAKAPPING
Ingrid Bjarnastein

Svanna Nørspang skipar fyri myndakappingini hjá 3aranum

Mynd: Jens Kr. Vang

Dómararnir, ið eru navnleysir, verða tríggir í tali, skulu leygardagin 20. oktober finna ársins summarmynd í myndakappingini hjá 3aranum.

Dómararnir døma eftir, um myndin yvirhøvur er ein summarmynd, motiv, hvussu tær eru tiknar og so framvegis.

Nakrir trupulleikar hava verið við myndum, av tí summi fólk hava sent myndir inn, sum bara eru tiknar heima í stovuni, og als ikki kunnu koma undir heitið »summarmynd«. Tær myndirnar vórðu so sendar aftur til eigaran.

Svanna Nørspang er tann, ið stendur fyri myndakappingini.

– Seinastu vikuna hava vit fingið ógvuliga nógvar myndir sendandi. Talið á innsendum myndum er nú komið uppá umleið 350. Freistin at senda myndir inn er ikki úti fyrr enn leygardagin, so eg vænti, at fáa umleið 400 myndir við í kappingina, sigur Svanna Nørspang.

Allar myndirnar verða margfaldaðar í litum og vaksið verður eisini um tær, so mátini verða 20x30 cm. Síðani verða tær límaðar á eina stóra plátu. Uppruna-myndirnar verða beinanvegin sendar aftur til eigaran.

Pláturnar skulu so setast upp á torginum í SMS, har høvi verður at síggja allar innsendu myndirnar. Myndirnar verða at síggja frá mánadegnum 15. oktober til leygardagin 20.

Høvuðsvinningurin í kappingini er ein vikuskiftisferð fyri tvey til Keypmannahavnar á fýrastjørnaðum hotelli. Næstbestu og triðbestu myndirnar fáa eitt digitalt myndatól frá Minolta. Av tí at undirtøkan hevur verið so góð fáa myndirnar frá nummar fýra til 10 eisini ein vinning.

– Hetta er ikki rættiliga sett uppá pláss enn, men tað verður helst ein gávupakki av einum slag, sigur Svanna at enda.

Russiskir hermenn í Afghanistan

Servandir russiskir hermenn og nógv russisk herútgerð er komin til Afghanistan, sigur russiskur hernaðarserfrøðingur

Russiskir servandir hermenn sita í russiskum stríðsvognum og við russiskar kanónir á vígvøllinum nakrar fáar kilometrar frá afghanska høvuðsstaðnum Kabul, sigur best kendi hernaðarserfrøðingurin í Moskva, Pavel Felgenhauer. Hann sigur seg hava tíðindini frá einum tjóðartingslimi, sum herfyri segði, at Russland longu er komið upp í kríggið í Afghanistan.

– Vit eru longu komin upp í kríggið, ti vit hava longu latið Norðursamgonguni nógva herútgerð, og saman við útgerðini hava vit latið teimum serfrøðingar, teknikarar og ráðgevar, skal tjóðartingslimurin Aleksej Arbatov hava sagt.

Í Moskva er alment kent, at júst Arbatov og Felgenhauer hava gott samband við ovastu russisku herleiðsluna, og tíðindi frá teimum báðum hava rættiliga ofta víst seg at vera sonn.

Trýsta vígvøllin suðureftir

Í einari grein í blaðnum Moskovskie Novosti skrivar Pavel Felgenhauer, at russiska herleiðslan er ósamd um avgerðina at senda hermenn til Afghanistan. Roknað verður við, at amerikanarar fara at senda hermenn inn í syðra partin av landinum. Tí er væntandi, at Taliban-herdeildirnar fara at hopa undan norður ímóti markinum til Uzbekistan og Tadjikistan, og at tær kanska eisini fara um markið inn í tey bæði londini. Hendir tað, kann tað koma Russlandi sera illa við, skrivar Pavel Felgenhauer í greinini.

Sambært Felgenhauer er júst hetta orsøkin til, at russiska herleiðslan valdi at lata Norðursamgonguni tunga herútgerð og russiskar serfrøðingar, so teir kunnu trýsta vígvøllin longur suður.

Russisku hermenninir, sum eru í Afghanistan, eru ikki í russiskum hermannabúna, sum teir skulu ikki verða avdúkaðir. Ein annar spurningur er, hvat hendir, um Taliban-hermenn taka ein russiskan hermann fanga. Tá noyðist Moskva annaðhvørt at látast um einki ella at samráðast við Taliban.

Starvsfólk til Goymsluna



" Viðskiftafólk eru ikki viðskiftafólk. Viðskiftafólk eru menniskju "

Ókendur

Søkt verður eftir starvsfólki til goymslu okkara á Hálsi í Tórshavn at byrja 1. november 2001 ella skjótast møguligt.

Uppgávurnar eru:
Vøruútflýggjan, skráseting og annars alt vanligt goymsluarbeiði.

Tín førleiki:
Umsøkjarin skal hava goymsluútbúgving ella hava royndir innan goymslu ella líknandi. Dentur verður lagdur á, at tann sum sett/-ur verður kann veita eina góða tænastu, kann arbeiða sjálvstøðugt og arbeiða væl saman við øðrum.

Eisini er fyrimunur um tú hevur:
· royndir við EDV (á brúkarastøði)
· góðan røkjuskap
· kunnleika til enskt

Føroya Tele kann bjóða eitt starv
· í einum mennandi umhvørvi
· við fakligari og persónligari menning
· í góðum arbeiðsumhvørvi

Eftir nýggjár letur Føroya Tele upp egnan integreraðan dagstovn í samstarvi við Tórshavnar Kommunu, har starvsfólk á Føroya Tele hava framíhjárætt til ansingarpláss.

Lønin verður sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Føroya Tele.

Nærri upplýsingar um starvið, fáast við at venda sær til leiðaran á Goymsluni, Heina Eliasson Egholm á tlf. 303224 ella til Starvsfólkadeildina á tlf. 303114.

Starvið verður sett skjótast gjørligt. Umsókn við avrit av prógvum og møguligum ummælum, skal verða Føroya Tele í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 26. oktober 2001

Umsóknirnar skulu sendast til:

Føroya Tele
Starvsfólkadeildin
Postmoga 27
110 Tórshavn

Føroya Tele er partafelag, ið Føroya Landsstýrið eigur 100%. Á Føroya Tele arbeiða 250 fólk í 30 deildum á 14 ymiskum støðum kringa alt landið. Goymslan á Føroya Tele tekur sær í høvuðsheitum av innanhýsis sølu og innkeypi til tær ymisku deildirnar á Føroya Tele. Høvuðsvøra okkara eru jarðkaðalar, transmissiónútgerð, alskyns telefonlutir, installatiónútgerð, skrivstovulutir og mangt annað. Á Goymsluni starvast 5 fólk.

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum!

Barnakórstevna í Fríðrikskirkjuni

TÍÐINDASKRIV
Føroya Sanglærarafelag

Fríggjadagin 26. oktober fáa uml. 350 børn úr landsins skúlum møguleikan at hittast til stóra sangtiltakið "Barnakórstevnan 2001".

Stevnan byrjaði fyri tveimum árum síðani, við fyrstu stevnunu í Havn, har uml. 200 skúlabørn luttóku. Í fjør varð so boðið til barnakórstevnu á Kambsdali, har heili 500 børn úr 3. til 7. flokki luttóku.

Tað er Føroya Sanglærarafelag, sum skipar fyri hesi stevnuni. Í september verða tekstir og nótar sendir skúlum, sum hava meldað seg til. Umframt fáa øll eina fløgu við løgunum, so lættari er at venja sangirnar, sum í fleiri førum eru ókendir hjá nógvum. Eitt av endamálunum við sangstevnuni er at geva børnum nýggjar/ókendar sangir at syngja.

Hóast vit kalla tað eina barnakórstevnu, eru tað ikki bara barnakór, sum luttaka. Stórur partur av luttakarunum eru skúlaflokkar, sum hava ein ágrýtnan sanglærara, ið syngur nógv við børnunum.

Endamálið við barnakórstevnuni er
- at menna sangin í fólkaskúlanum
- at geva børnunum eina uppliving við at syngja saman við nógvum øðrum
- at fáa sett barnakór á stovn í skúlum kring landið.

Barnakórstevnan endar við einari konsert í Fríðrikskirkjuni kl. 15.30, har foreldur og onnur eru vælkomin at koma at hoyra, hvat ið komið er burtur úr henda dagin.

Føroya Sanglærarafelag fór í gongd við hetta tiltakið, ásannandi at tónleikur í fólkaskúlanum við nýggju skúlalógini hevði fingið nógv verri somdir. Í nýggju skúlalógini er fakið lagt undir fakbólkin Handaverk og list, og verður hervið skorið niður í tímatali frá 8 tímum í niður í 5 tímar tey 7 skúlaárini.

Sambært fólkaskúlalógini, kunnu skúlar bjóða næmingum undirvísing í frítíðini. Ofta er tað tónleikur, teimum stendur í boði (gittarspæl, orkestur, blokkfloyta kór o.s.fr.) Allir skúlar fáa tillutað ávíst tímatal í mun til næmingatalið til hetta endamál.

Tónleikaundirvísingin í hesum høpi hevur alstóran týdning fyri tónleikaundirvísingina í fólkaskúlanum og fyri fólkaskúlan sum heild. Her fáa áhugaðir næmingar høvi til at menna seg tónleikaliga, og fær hetta eisini positiva ávirkan á kravdu tónleikatímarnar og aðra undirvísing yvirhøvur.

Tað er ógvuliga misjavnt, hvussu skúlarnir velja at brúka hesar tímar. Á nógvum skúlum eru hesir tímar fyri langt síðani tiknir til annað endamál - kanska tí tímarnir til vanliga undirvísing eru ov fáir.

Í summar (juli) komu boð úr Mentamálastýrinum til allar skúlar, at í hesum skúlaárinum fram til 1. januar 2002 skuldi tímar til undirvísing í frítíðini *ikki* brúkast til hetta endamál.

Undir hesum umstøðum, sær ikki út til, at vit kunnu roknað við, at nógv barnakór verða sett á stovn í skúlunum kring landið. Áhugin er stórur, men umstøðurnar ikki nøktandi.

Útlendingar seta dám á flogbóltin

Bæði kvinnur og menn seta í dag sjøtil á meistaradeildina. Hjá kvinnunum verður ein sera áhugaverdur dystur í Klaksvík í dag millum Mjølnir og TB. Hjá monnunum skulu meistararnir ÍF til Sørvágs, og tað verður neyvan so lætt, sum ein kundi trúð. Aftur í ár eru fleiri nýggir útlendskir leikarar komnir til landið

Hetta er vikuskiftið, tá flogbólturin av álvara fer í gongd aftur. Og bæði hjá kvinnum og monnum sær tað rættiliga spennandi út í meistaradeildini. Fleiri lið hava brúkt hesar seinastu mánaðirnar til at styrkja seg við útlendskum leikarum. Tað ber sjálvandi illa til at siga longu nú, hvussu hesir fara at roynast, men í øllum førum fara tey útlendsku flogbóltsfólkini aftur í ár at seta sín serstaka dám á flogbóltskappingina.

TB spennir bogan

Eitt av liðunum, sum seinastu árini hevur verið við til at mynda kvinnukappingina, er TB. Í fjør vunnu suðuroyarkvinnurnar bronsu, men tær vóru ongantíð nær við tey hægru plássini, og kappingin bleiv skjótt ein kapping millum Drátt og Mjølnir. Men í ár kundi okkurt bent á. at TB veruliga ætlar at vera, har tað er stuttligast at kappast. Tveir útlendskir leikarar úr ávikavist Rumenia og Jugoslavia eru komnir til Tvøroyrar, og um hesar báðar gerast ein góður fongur hjá TB, er væl hugsandi, at Suðuroyggin veruliga fer at gera seg galdandi í vetur. Og TB-kvinnurnar fáa beinanvegin møguleika fyri at vísa, hvat tær ætla í ár, tí tær byrja kappingina í dag á útivølli móti Mjølni. Ein hørð byrjan, tí á heimabeiti plagar Mjølnir ikki at vera til at spæla við. Tann dysturin er settur at byrja klokkan 13.00, og so verður áhuavert at síggja TB-liðið royna seg móti Mjølni, sum altíð er at rokna millum FM-favorittarnar.

Føroyameistararnir úr Drátti leggja út við heimadysti á Giljanesi móti ÍF. Her verða Marina Popovic og hinar í Drátti favorittar, og tað er so nakað, tær mugu venja seg við. Sum føroyameistari finnur ein skjótt útav, at trýstið er størri enn annars, ikki minst tí hini liðini gera sítt ítrasta og kanska eitt sindur afturat, tá tað eru sjálvir meistararnir sum standa hinumegin netið.

Í morgin hittast Fossánes og Fleyr. Tað gekk sera illa í hond hjá Fossánesi í fjør, men Fleyr var so tað liðið, tær stóðu seg best ímóti seinasta kappingarár. Sum heild verður roknað við, at hesi bæði liðini fara at stríðast í niðaru helvt av stigatalvuni í vetur, men annað av liðunum fer so at byrja kappingina við einum sigri, og tað er jú altíð gott.

Kvinnuflogbólturin er spjaddur út um alt landið. Suðuroyggin, Vágarnar, Eysturoyggin, Norðoyggjar og Havnin hava øll umboð í meistaradeildini, og tað er hugaligt. Hinvegin merkir tað so, at tað ikki er landfast millum tey flestu liðini. Men Mjølnir og Fossánes eru grannar, og tí ber til hjá teimum at spæla næstan nær tað skal vera. Og tann fyrsta av teimum grannauppgerðunum verður mikukvøldið. Men fyrst og fremst hava leikararnir eyguni vend móti uppgávunum, sum standa fyri framman í dag og í morgin.

Føroyameistarar til Sørvágs

Í kappingini hjá monnunum hevur nógv verið tosað um SÍ hesa seinastu vikuna. Tað eru fleiri onnur feløg í meistaradeildini, sum hava stoltari traditiónir enn SÍ, men farna vikuskifti gjørdu sørvingar bart og tryggjaðu sær pláss í steypafinaluni, sum verður komandi vár.

Borko Ilic er vorðin venjari í Sørvági, og ein annar útlendskur leikari er við á SÍ-liðnum. Og í landskappingini leggja teir hart út, tí í dag koma føroyameistararnir úr ÍF vestur at vitja. ÍF telist aftur í ár millum favorittarnar, og hetta verður ein verulig styrkiroynd hjá SÍ, sum í fjør endaði langt aftast, men sum í ár sær út til at ætla sær longri upp.

Tá vit leita eftir einum avbjóðara til meistaraheitið hjá ÍF, sær Fram næstan út til at vera frægasta boðið. Romica Pascu og hansara menn skulu til Klaksvíkar at leika móti Mjølni, og hesin dysturin kann geva eina góða ábending um, hvar liðini bæði flóta í ár. Mjølnir byrjaði sera væl í fjør og var á odda í grundspælinum. Men aftaná nýggjár fóru teir at tapa, og so dragnaðu teir skjótt. Spurningurin er so, um tann gongdin skal halda fram nú hálvt ár seinni, ella um Mjølnir kemur aftur á vinnarakós.

Fimm lið eru í meistaradeildini hjá monnum. Fimta liðið, sum er Fleyr, spælir ikki hetta vikuskiftið. Eins og áður verður borið so í bandi, at tað felagið, sum ikki spælir eitt vikuskifti, í staðin fær dómarauppgávur at skipa, og tað hevur Fleyr so hetta vikuskiftið.

Dystir hetta vikuskifti:

Meistaradeild kvinnur

13/10 Mjølnir-TB	13.00
13/10 Dráttur-ÍF	14.00
14/10 Fossánes-Fleyr	15.00

Meistaradeild menn

13/10 SÍ-ÍF	14.00
13/10 Mjølnir-Fram	15.00